# Høvi til stór sambond í oljuvinnuni



Kjell Ursin-Smith, stjóri í ONS Grunninum.

Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com

**‘Shaping the energy future’ er høvuðsevni á tí stóru altjóða oljustevnuni ONS 2004 í Stavanger í august – ein stevna ið gevur føroyingum høvi at knýta týðandi kontaktir innan olju og gass, ikki minst gjøgnum higartil væl eydnað føroysk mentanarlig innsløg.**

FRÁLANDAVINNA
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Fyrireikingarnar til oljustevnuna ONS 2004 eru komnar væl áleiðis og framsýningar básarnir eru meira ella minni útseldir, upplýsir leiðslan fyri Offshore Northern Seas. Tað stóra temaið fyri stevnuna í Stavanger 24-27. august ber heitið ‘Shaping the energy future’ og høvuðsrøðarin kemur frá hægsta toppinum í Shell, upplýsir Kjell Ursin-Smith, stjóri í ONS Grunninum.

»Vit hava altíð fokuserað á nýggja tøknifrøði og framsýningin í ár fer at undirstrika hetta enn meira,« segði Kjell Ursin-Smith fyrst í apríl við ein bólk av altjóða pressufólki ið vóru boðin til Noregs at fáa kunning um ONS 2004.

Saman við einari messu annaðhvørt ár í Aberdeen og einari á hvørjum ári í Houston, er ONS heimsins einasta stóra, regluliga hildna stevna fyri altjóða olju- og gassvinnuna. ONS framsýningin og ráðstevnan setir annaðhvørt ár, aftur við einari mentanarligari ONS Festival, eitt serligt lív í tann norska oljuvinnu høvuðsstaðin Stavanger. Fyri eina spírandi føroyska oljuvinnu gevur alt hetta heilt serlig høvi til at knýta týðandi sambond, meinar Kjell Ursin-Smith.

Kjell Ursin-Smith kundi upplýsa at ein nýggjur heiðursprísur fyri meðalstórar og smærri fyritøkur er lagdur aftur at tí kendu ‘innovatións virðislønini’ og fleiri virkir hava longu fingið skrásett síni luttakandi verkevni. Millum luttakararnar teljast fyritøkur ið skulu sýna fram í Innovatións Parkini, eitt nýtt tiltak undir ONS 2004 har tilsamans 25 smærri og størri fyritøkur, ið hava tað til felags at tær leggja stóran dent á innovatión ella unik produkt, saman fara at skapa eina ‘high-tech park’ á framsýningar økinum.

»Vit vænta okkum nógv av hesari parkini,« helt Kjell Ursin-Smith fram. »Hon man fara at verða samtaluevni hjá mongum vitjandi.«

## Við Rio undir lið

Ráðstevnan á ONS 2004 skal seta gass og europeiskt trot á orku í brennidepilin. Onnur framstandandi evni á skránni eru nýggj tøknifrøði fyri meira effektiva útvinning, herundir ikki minst hugtakið ‘e-felt’ ella á eingilskum ‘e-field’ ið snýr seg um at gagnnýta samskifti og tøknifrøði optimalt í sambandi við samskipan av arbeiði úti á feltunum.

Høvuðstalarin verður Jeroen van der Veer, nevndarformaður fyri Royal Dutch/Shell bólkin. Hann skal seta ráðstevnuna við einari røðu um geopolitisk viðurskifti innan olju og gass fyri síðani at taka lut í einum panel orðaskifti. Millum hini í panelinum, við Colin Moynihan lordi sum orðstýrara, teljast Klaus Töpfer, Sameindu Tjóða vara aðalskrivari, og Eivind Reiten, forseti og hægsti executive leiðari í Norsk Hydro ASA.

Ein annar serligur inniheldspartur av ONS 2004 verður Young Professional Company Award, ein kapping millum bólkar av ungum yrkisfólkum um at gera mest sannførandi framløgur viðvíkjandi týðandi eyðkennum í gongdini sum heild og teimum stóru avbjóðingunum í ídnaðinum.

»Vit fylgja upp okkara suksess frá 2002,« viðmerkti ein væl upplagdur Kjell Ursin-Smith.

ONS Festivalin er ein av teimum pørtum ið ger ONS til eina unika stevnu. Í ár kunnu tey mongu vitjandi uppliva eitt sindur av seks spennandi havnabýum við atknýti til frálanda oljuvinnu, nevniliga okkara egnu Tórshavn, brasilska Rio de Janeiro, spanska Bilbao, italska Ravenna, og norsku Florø og Kristiansand. Hvørt kvøld skulu leiðandi norskir og altjóða artistar framføra á tí stóra pallinum við havnalagið.

»Sum vant fara vit at geva okkara gestum eitt serstakt høvi til at møta spennandi kontaktum undir ONS,« legði Kjell Ursin-Smith afturat.

## Týðandi sambond

Tvær ferðir áður hava innsløg úr Føroyum verið millum attraktiónirnar á ONS Festival, og í ár luttaka føroyingar soleiðis fyri triðju ferð. Sum skilst skulu Eivør Pálsdóttir og Kristian Blak framføra føroyskan tónleik meðan sluppin Norðlýsið skal seta dám á í havnalagnum og Birgir Enni skal vísa upp hvør dugur er í føroyskari matgerð, nakað ið eftir øllum at døma tók fólk í Stavanger á bóli fyri tveimum árum síðani.

»Tað hevur verið til gleði og inspiratión fyri okkum at hava luttakarar úr Føroyum á ONS,« viðmerkti Kjell Ursin-Smith víðari. »Fyrst við egnum bási á okkara framsýning og seinni eisini sum luttakarar við egnari pavillion á festivalini hjá okkum. Soleiðis sum eg síggi tað hevur tann mátin føroyingar hava luttikið uppá givið bæði teimum og okkum nógv.«

»ONS er ein framsýning við 1200 altjóða framsýnar-um, harav 60 prosent koma úr øðrum londum enn Noreg. Vit eru einasta fram-sýning í heiminum ið hevur øll tey stóru oljufeløgini við sum framsýnarar og tað eigur tí at vera serstakliga áhugavert fyri bæði føroyskar fyritøkur og føroyskar myndugleikar at vera til staðar. Her er høvi at møta teimum røttu fólkunum í okkara vinnu. Tá ið føroysk felt einarferð í framtíðini fara at verða útnevnd sum rakstrarverd, eru tær røttu kontaktirnar longu har gjøgnum luttøku á ONS.«

»Eg ivist heldur ikki í at øll tey sambond sum eru etablerað á politiskum stigi, bæði landspolitiskt og á kommunalum stigi, fara at hava týdning í framtíðini.«

»Føroyar hava harafturat verið ein partur av Festivalini. Eg var sjálvur ofta í tjaldinum hjá føroyingum fyri tveimum árum síðani og har uddi við fólki. Fólk ið ynskja meira kunning um tykkara undursama land, og sum gjøgnum mat og drekka og serlig føroysk produkt sum ullvørur, glas og steinvørur, fingu ein smakk av tí føroyska. Fyri ikki at gloyma tey mentanarligu innsløgini - vit gleða okkum serstakliga nógv til at hoyra Eivør Pálsdóttir og Kristian Blak.«

# So norskt sum norskt kann vera

**Norsk Hydro hevur 100 ár á baki og 172 milliardir krónur í árligum umsetningi – og størri leiklut enn nakað annað felag í moderniseringini av Noreg.**

ORKA
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Fáar fyritøkur er meira umboðandi og grundleggjandi fyri norskt vinnulívi enn Hydro. Felagið er líka gamalt sum tann norski staturin og hevur stóran leiklut í so at siga allari moderniseringini av Noregi.

Tað byrjaði við ídnaðarligari framleiðslu av handilstøðum; síðani var tað orka úr norskum fossum og annað slóðbrótandi vísindaligt og tøknifrøðiligt arbeiði sum aftur við svenskum, fronskum og týskum kapitali gjørdi Hydro til eitt altjóða ídnaðarvirki.

Aftan á nøkur ár við kreppum, niðurgangstíðum og tveimum oyðandi heimskríggjum, gjørdist Hydro ein enn størri framleiðari av plantuføðslu og fór so smátt undir at framleiða løtt metall eisini. Samstundis fór felagið upp í kolvetnis og petrokemiskan ídnað. Seint í 1970unum vaks Hydro nógv, ikki minst gjøgnum uppkeyp av øðrum feløgum í Noreg og aðrastaðni. Við ábyrgd sum operatørur á Oseberg feltinum kom felagið inn á eitt nýtt menningarstig sum oljufelag. Hydro yvirtók ÅSV og stovnaði Hydro Aluminium og umsetningurin fleirfaldaðist. Felagið internationaliseraðist samstundis í stóran stíl: í byrjanini av 1980unum vóru 75 prosent av arbeiðskraftini norsk; tíggju ár seinni eru hesi færri enn 50 prosent.

Tey seinastu tíggju árini er Hydro vorðið enn meira internationalt. Europa er framvegis tann størsti marknaðurin men vøksturin er stórur í Asia og Amerika. Inntøkurnar hava verið góðar frá væl eydnaðum olju- og gassprojektum, og felagið hevur engagerað seg í kolvetni í millum annað Russlandi, Kanada og Angola. Virksemið er vorðið konsentrerað um vinnuøkini Olju og Orku, Aluminium, og Landbúnað. Aftan á yvirtøkuna av týska metallrisanum VAW er Aluminium nú størsta vinnuøki.

Norsk Hydro telist ídag millum heimsins fremstu framleiðarar av olju og gassi í havumhvørvi. Felagið er leiðandi innan orku og aluminium, við virksemi í 40 londum. Hydro er heimsins triðstørsti veitari av aluminium og verður roknað sum ein týðandi aktørur tá tað snýr seg um menning av endurnýggiligum orkukeldum. Tann norski staturin er størsti einstaki eigari men situr tó ikki á meirilutanum av partabrøvunum. Umsetningurin í 2003 var 172 milliardir norskar krónur, harav góðar 10 milliardir í avlopi. Hydro hevur góð 44.000 fólk í starvi.



Tore Torvund, Executive Vice President, Norsk Hydro ASA.

Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com



# Frá Orminum Langa gongur heimsins longsta undirsjóvar rørleiðing

**Skjótt verður skrúvað upp fyri tí heita gassinum gjøgnum rørleiðingar úr tí kalda Norska Havinum suður til Bretlands og seinni eisini fastlands Europa - í einari risa íløgu fyri 66 milliardir krónur**

ORKA
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Noreg er meira enn heimsins triðstørsti útflytari av olju; um fá ár verður landið eisini triðstørsti útflytari av gassi. Hetta verður úrslitið av einari 66 milliardir krónur verkætlan við tað risastóra gassfeltið ‘Ormen Lange’ út fyri norsku norðurvestur strondina, við gassleiðingum til reinsiverk á landi; úr Nyhamna skal heimsins størsta undirsjóvar rørleiðing, ‘Langeled’ leggjast 1200 kilometrar suður til Easington í Onglandi.

Í oktober 2007 skal gassið eftir ætlan streyma inn á bretska marknaðin og uppfylla umleið ein fimtapart av tí samlaða tørvinum hjá bretum hvat húsarhalds hita og aðrari gassdrivnari orku viðvíkur. Sambært Norsk Hydro, ið stendur sum operatørur fyri verkætlanina fram til framleiðslu tá ið Shell so tekur við, kann gassið frá Ormen Lange geva umleið 10 milliónum bretum hita í upp til 40 ár.

Ormen Lange er næststørsta gassfelt funnið í Noreg; tað liggur í Norska Havinum og strekkir seg einar 100 kilometrar fram við tí norsku strondini. Havdýpið í umráðnum liggur millum 850 og 1100 metrar og hetta ger Ormen Lange til fyrstu veruligu útbygging í Noreg á so djúpum vatni. Tær útvinningsbaru mongdirnar av gassi í feltinum eru mettar til umleið 400 milliardir kubikkmetrar og 28,5 milliónir kubikkmetrar av kondensati. Nyhamna, við norsku vesturstrondina, er valt sum pláss fyri eitt reinsiverk á landi; haðani skal gassið útflytast gjøgnum eina nýggja rørleiðing via Sleipner boripallin í Norðsjónum til Easington við ta eingilsku eysturstrondina. Sleipner skal virka sum eitt knútpunkt fyri rørleiðingina, og seinni er ætlanin at binda beinleiðis í europeiska meginlandið.

## 1.000.000 tons stál

Aftan á at Stórtingið beint fyri páskir einmælt samtykti at góðkenna Ormen Lange loyvið og ta tilhoyrandi Langeled samstarvs verkætlanina, hevur Hydro sum operatørur latið norska Kolvetnis- og Orkumálaráðnum ‘Ætlanina fyri Menning og Rakstur’ (PDO) ið viðvíkur menning av feltinum, og ‘Ætlanina fyri Installatión og Rakstur’ (PIO) ið viðvíkur flutningsskipanina.

Ætlanin fyri Menning og Rakstur (PDO) inniheldur tvær høvuðs verkætlanir: eina frálanda framleiðslu skipan og eitt reinsiverk á landi. Ætlanin fyri Installatión og Rakstur (PIO) inniheldur í høvuðsheitum eina norðaru rørleiðing, 42 tumma diametur, frá Nyhamna til Sleipnir pallin; undirsjóvar ventilstøð við Sleipner økið og útbyggingar av Sleipner pallinum; og eina syðru rørleiðing, 44 tumma diametur, frá Sleipner til Easington; móttøkustøð Easington.

Hydro sum fann gassfeltið Ormen Lange í 1997 fer nú í holt við at byggja undirsjóvar brunnar og rørleiðingar á feltinum. Undirsjóvar loysnin hjá Hydro verður væntandi ein mílasteyri í tí tøknifrøðiligu menningini innan norskan olju- og gassídnað, og tá tað enorma gassfeltið fer í framleiðslu um trý ár, skal einki síggjast til nakað oman fyri vatnskorpuna.

»Okkara satsing upp á innovatión og umhvørvis vinarliga útvinning av náttúru tilfeingi gevur okkum eina skyldu at loysa hesar avbjóðingar upp á best møguliga máta,« segði Bengt Lie Hansen, stjóri fyri Hydro Utforskning og Produksjon Norge.

»Verkætlanin og raksturin verða lagað eftir høgum krøvum um heilsu, umhvørvi og trygd… Byggingin av reinsiverkum, rørleiðingum og terminalum skal eftir ætlan í gongd nú í vár. Process anleggini hjá Ormen Lange koma at reinsa einar 20 milliardir kubikkmetrar av gassi um árið - hetta mótsvarar umleið ta árligu orkunýtsluna hjá øllum Noreg. Byggingin av rørleiðingunum fer at krevja eina millión tons av stáli og fer at leggja hald á ein stóran part av heimsins samlaða kapaciteti fyri framleiðslu og montering av rørleiðingum.«

Tann óviðgjørdi brunnstreymurin frá Ormen Lange skal fyrst førast í land til Nyhamna í tveimum 120-kilometur longum 30 tumma rørleiðingum. Á landi verður gassið so processað og gjørt klárt til útflutnings fyri síðani at verða leitt suðureftir gjøgnum Langeled undirsjóvar rørleiðingina.



*Bengt Lie Hansen, stjóri fyri Hydro Utforskning og Produksjon Norge og formaður í stýrisnevndini fyri partnaraskapið kring Ormen Lange, undir einum borðhaldi saman við altjóða pressufólki.*

Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com

## Arbeiði til 16.000

Eitt er støddin og tað búskaparliga umfangið av verkætlanini; eitt annað tær tøkniligu og jarðfrøðiligu avbjóðingarnar. At byggja 24 brunnhøvd ið frá havbotninum ein kilometur undir vatnskorpuni skulu knýtast í rørini inn á land, krevur framkomna undirsjóvar robott tøknifrøði. Hartil kemur at temperaturin á hesum havdýpi liggur niðan fyri frostmarkið, hvat ið kann elva til at íspettir myndast sum kunnu blokkera flotið í rørleiðingunum um framleiðslan skuldi steðga á. Tí er tað avgerandi at tryggja gott flot í rørleiðingunum, og hetta vil Hydro loysa gjøgnum at áhaldandi tilføra frostvætu við brunnhøvdini, soleiðis at streymurin frá brunninum ikki frystir til. Frostvætan verður so skild úr aftur í reinsiverkinum og brúkt umaftur uppi á landi.

Enn ein avbjóðing liggur í landslagnum á havbotninum har nógvir heyggjar reisa seg 30-60 metrar upp frá og gera botnin ójavnan. Rørleiðingin má leggjast gjøgnum hesi landsløg soleiðis at tey fríu rørspennini ikki gerast ov long - annars uppstanda óynsktar ristingar; tað ræður samstundis um at ansa eftir at tey ikki eru í vanda fyri at koma føst í trol ella annan fiskireiðskap. Síðani hevur hetta sera veðurringa umráðið eisini nakrar av heimsins harðastu undirsjóvar streymum. Og so mugu rørleiðingarnar eisini leggjast um eitt 300 metrar høgt og steyrrætt undirsjóvar berg.

Bengt Lie Hansen, sum eisini er formaður í stýrisnevndini fyri partnaraskapið kring Ormen Lange, duldi ikki fyri sínari frøi tá hann fyrr í apríl kundi handa tí norska ráðharranum fyri olju og orku, Einar Steensnæs, Ætlanina fyri Menning og Rakstur (PDO) og Ætlanina fyri Installatión og Rakstur (PIO).

»Tað kennist stórt at kunna levera ætlanirnar vit hava arbeitt við so leingi,« viðmerkti hann. »Vit hava arbeitt grundliga fyri at skjalprógva at loysnin við at fyrst senda gassið upp á land til processing og klárgering til útflutning er ein burðardygg og álítandi loysn. Vit eru glað fyri at eitt samlað partnaraskap hevur váttað at ætlanirnar eru haldførar og útgera eitt gott grundarlag fyri íløguna upp á 66 milliardir krónur.«

Partnarar í Ormen Lange eru Hydro (útbyggingar fasu operatørur), Shell (rakstrar fasu operatørur), Petoro, Statoil, BP og Exxon Mobil.

Langeled samstarvs verkætlanin, við luttøku av somu feløgum umframt ConocoPhillips og Gassco, hevur til endamáls at byggja, reka og eiga flutningsskipanina millum Nyhamna og Easington. Langeled flutningsskip-anin bestendur av einari rørleiðing upp á umleið 1200 kilometrar tilsamans og verður harvið heimsins longsta undirsjóvar gassleiðing.

»Ormen Lange fer at økja norskan útflutning av gassi við 25 prosentum til meira enn 100 milliardir kubikkmetrar um árið og fer at gera Noreg til triðstørsta gass útflytara í heiminum,« staðfesti Bengt Lie Hansen.

»Útbyggingin er størsta einstaka projekt í Noreg og umboðar ein munandi part av øllum frálanda íløgum í Noreg tey komandi fýra árini. So mikið sum 16.000 fólk fara beinleiðis og óbeinleiðis at arbeiða við útbyggingini.«



*Tekning yvir undirsjóvar útbyggingarnar av Ormen Lange gassfeltinum í Norska Havinum.*

Grafikkur: Norsk Hydro